AVRIT

LØGTINGIÐ

Ken Nónklett, adv.
Sundsvegur 15
100 Tórshavn

Løgtingsformaðurin

**3. mars 2022**
**j. nr. 1111-20210001**
(at tilskila í svari)

Vísandi til stýrisskipanarlógina § 38, stk. 2 útnevnir undirritaði tygum til kanningarstjóra til tess at kanna og gera eina frágreiðing til Løgtingið, hvørt Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum hevur umsitið sítt málsøkið á lógligan hátt í sambandi við útlutingar av fiskirættindum.

Tygum verða biðin um at kanna, lýsa og gera niðurstøðu um avgerðirnar, sum tiknar eru av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, í sambandi við útlutingar av fiskirættindum sambært § 49 í sjófeingislógini í 2020 og í 2021, og sum fevna um:

1. Útluting av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir
2. Útluting av ískoytiskvotum, og
3. Útluting av kvotum til ítøkiligt skipakeyp.

Tygum verða biðin um at kanna, hvørt viðgerðin av umsóknunum og tiknu avgerðirnar hjá landsstýrismanninum í hesum útlutingum hava verið í samsvari við lóggávuna, tvs. við løgtingslóg nr. 152 frá 23. des. 2019 um sjófeingi við seinni broytingum og við fyrisitingarlógina.

Tygum verða biðin at lýsa, hvørt viðgerðin av øllum umsóknunum hevur verið lóglig, saklig og fullgóð, undir hesum

- hvørt umsøkjarar, ið fingu tillutað rættindi, uppfyltu tey høvuðskrøv, ið sett vórðu í lóg, kunngerð, metingarskjølum o.ø.
- hvørt umsøkjarar, ið vórðu vrakaðir, uppfyltu hesi somu krøv
- hvørt tiknu avgerðirnar eru heimilaðar í lóggávuni
- hvørji tilmælini vóru frá umsitingini í Fiskimálaráðnum, og hvørt landsstýrismaðurin fylgdi hesum tilmælum, ella við hvørjum lógligum og sakligum grundgevingum landsstýrismaðurin tók møguliga aðra avgerð enn hana, sum umsitingin mælti til
- legði landsstýrismaðurin dent á aðrar treytir ella atlit, enn tey, ið lýst vóru í lóg, kunngerð, metingarskjølum o.l., og vóru hesar sakligar, um so var.

Um komið verður fram til, at viðgerðin av hesum útlutingum ikki hevur verið nøktandi, verða tygum biðin um at meta um, hvørt talan kann vera um brot á løgtingslóg nr. 90 frá 4. juni 1996 um ábyrgd landsstýrisins.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

Tygum verða biðin um at gera avtalu við umsiting tingsins um samsýning v.m. fyri arbeiðið.

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður